†

Kunngjørt verður, at kæri maður, pápi, verpápi, abbi og beiggi okkara

Birgir Danielsen

føddur 5. juli 1928, andaðist 20. oktober 2001.

Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju hósdagin kl. 13.

Familjunnar vegna

Bina, Gunn og Uni

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá ið okkara góði maður, pápi, verfaðir, abbi, bróðir og svágur

Petur Martin Danielsen

doyði og varð jarðaður.

Takk til øll, ið hjálptu til á ymsan hátt. Eisini verður takkað fyri blómur og peningagávur til KFUM- og K í Havn.

Familjunar vegna

Hanna, Armgarð og Durita

Minningarorð um bróður mín
Eskhild Hansen

3. oktober andaðist bróður mín, Eskhild Hansen, 81 ár. Hann var ættaður úr Sumba, men búði í Sandgerði í Íslandi tað mesta av sínum lívi, har kona hansara Svava eisini var frá. Hon doyði fyri fáum árum síðani. Saman fostraðu tey upp børnini Henrik og Sólrun, so saknurin hjá teimum verður stórur, nú Eskhild er farin.

Hann gloymdi aldri føðilandið, og var næstan hvørt summar heima í Føroyum á vitjan og seinast var í juni í ár. Honum dámdi væl at vera saman við familju og kenningum í bæði gleði og gleim. Sangir yrkti hann nógvar, ið ofta snúðu seg um føðilandið, sum hann hevði kært. Sera gott mál hevði Eskhild at syngja við. Seinasta vit báðir vóru saman var í juni mánaða í ár, tá vit vóru í studentaveitslu í familjuni. Har hevði hann tað gott og var saman við familjuni og har sang hann sín seinasta sang.

Nú jólini nærkast og jólaheilsanir verða sendar úr øllum heiminum ígjøgnum útvarpið, verður saknurin stórur ikki at hoyra Eskhild senda jólaheilsanir úr Sandgerði, sum hann sendi hvørji jól til ætt og vinir. Hervið endi eg míni orð við einum av mongu sangunum, ið Eskhild hevur yrkt um føðilandið.

So eina man situr og hugsar
um tíð ta ið farin er,
so víða man hugurin reika
og mangt tað ið eygað sær,
at lívið tað vert er at liva
so mongum tað eydnu ber,
tí seti eg meg til at skriva
um alt sum mær stendur nær.

Tað stutt var tann tíðin man livdi
á Føroyalands fløtum har,
nú angur og tregi meg pína
bert longsul eg fái sum svar,
men einferð skáa eg fái
ta dýrastu perlu á jørð,
tær oyggjar sum rísa úr havi
á háttprúða Beinissvørð.

Um fjallatind vindar strúka
har kendi eg hjartafrið,
ímillum spinar og knúgar
og standa við teirra lið,
eg biði av innasta hjarta
tað verði mín sæla stund,
at unna tí landinum hjartað
við brimi um nes og sund.

Farvæl kæru oyggjar tær prúðu
tær prúðastu her á jørð,
har fornkappar áður búðu
nú blómur og gras her grør,
eg elski teg landið mítt fagra
eg minnist tann søta gleim,
í vón um at eg fái aftur
til tín at koma heim.

Friður veri við minninum um bróður mín Eskhild.

Jóhannes

Bygdaráðið vil ikki tosa

Bygdaráðið í Mikladals kommunu noktaði í heystferiuni fyri at fara á fund við foreldrini á Trøllanesi um skúlaviðurskiftini í kommununi

SKÚLASTRÍÐ
Eyðun Klakstein

Mikladals kommuna vil ikki hoyra talan um at brúka skúlastovuna á Trøllanesi aftur

Eingin loysn á skúlastríðnum í Kalsoynni er í eygsjón.

Foreldrini hava í eina tíð ynskt fund við bygdaráðið um skúlan, men í farnu viku kom umsíður svar upp á hesa umbøn.

Bygdaráðið í Mikladali svaraði, at tað vildi ikki hitta foreldrini á fundi. Í brævinum varð tíðarfest, at avgerðin hjá bygdaráðnum frá 9. január um, at skúli bara skuldi vera í Mikladali, stóð við.

Formaðurin í bygdaráðnum var heima í farnu viku, men hann er nú farin til skips aftur við Enniberg.

Framvegis heima

Tey átta børnini á Trøllanesi hava verið heima, síðani skúlin byrjaði eftir í august mánaði, og tað er einki sum bendir á, at tey fara aftur í skúla í bræði.

Meðan skúlastríðið stendur við, taka foreldrini á Trøllanesi sær av undirvísa børnunum heima.

Foreldrini á Trøllanesi vilja hava, at skúlin í bygdini verður tikin í brúk aftur. Hetta fingið tey eisini lovað frá landsstýrismanninum við skúlamálum, men tað vísti seg seinni, at landsstýrismaðurin kundi ikki geva hetta lyftið.

Tað er bygdaráðið, sum ger av, hvørji høli verða brúkt til skúlagongina, og bygdaráðið vil bara hava skúla í Mikladali.

TELEFONKIN

Vælskapt brek handar peningagávur

Áhugabólkurin aftanfyri Vælskapt brek. Frá vinstru Jóhan í Niðristovu, Lis í Niðristovu, Hilmar Jan Hansen, Sigrið Sivertsen og Bartal Kass

Fyri nærum tveimum árum síðani varð áhugabólkurin aftanfyri tiltakið vælskapt brek fyrstu ferð samlaður. Tá varð skrivað út sangskrivarakapping til eina fløgu, hvørs yvirskot skuldi fara til MBF og ÍSB

PENINGAGÁVUR
Ingrid Bjarnastein

Fløgan »Vælskapt brek« kom út í september í fjør, og siga stigtakararnir, at seldar eru umleið 1600-1700 fløgur. Nú er peningurin gjørdur upp, og verður 20 ára føðingadagurin hjá MBF í dag nýttur sum høvi til gávuhandanina.

Áhugabólkurin vildi í gjár ikki avdúka upphæddina á kekkunum, men talan er helst um eina fitta peningagávu í øllum førum eftir søluni at døma.

– Vit hava mætt ógvuliga nógvari vælvild, og fólk hava tikið ógvuliga væl ímóti okkum, sigur Hilmar Jan Hansen, sum er ein av limunum í áhugabólkinum.

– Undirtøkan hevur verið ógvuliga góð. Umleið 70 sangir komu inn til sangskrivarakappingina, men tíverri sluppu bara 19 við á fløguna. Og til okkara stóra bilsni gjørdi Føroya Lívstrygging okkum tann beina at fíggja alla fløguna sum hon var.

Eli Smith hevði teknað eina kápumynd til fløguna, sum eisini varð prentað sum plakat til sølu. Í desember í fjør kundi áhugabólkurin fara við einum kekki til barnadeildina á Landssjúkrahúsinum áljóðandi 15.000 krónur bert fyri sølu av plakatum.

Hilmar Jan Hansen greiðir frá um Vælskapt brek

Faldari næsta stigið

Nú hesin kapitulin er yvirstaðin, er næsta punktið á skránni at fáa gjørt ein faldara við vegleiðing til foreldur at brekaðum børnum.

– Tann afturvendandi trupulleikin vísir seg at vera at foreldur mangla ráðgeving tá tey fáa eitt brekað barn, sigur Lis í Niðristovu, limur í áhugabólkinum.

– Í hesum faldaranum skal so standa, hvønn tey skulu venda sær til, hvørji rættindi tey hava og so framvegis. Faldarin skal vera eitt slag av hondbólk fyri foreldur at einum brekaðum barni. Foreldur fara ofta ígjøgnum sama stríðið, sum onnur hava verið ígjøgnum, og tí kunnu tey sleppa undan, men vita tað bara ikki, ella vita tey ikki hvussu.

Ætlanin er tí nú at arbeiða miðvíst ímóti at fáa tilfar til vega, soleiðis at foreldur kunnu fáa vegleiðing tá tey fáa brekað børn. Tá hetta er liðugt gjørt er kemur helst okkurt annað á skránna, men hvat tað er, er ikki fingið greiði á enn.

Áhugabólkurin fyri Vælskapt brek vil fegin takka øllum, sum hava stuðlað tiltakinum á ein og hvønn hátt.

Í áhugabólkinum eru: Jóhan í Niðristovu, Lis í Niðristovu, Hilmar Jan Hansen, Sigrið Sivertsen og Bartal Kass.

Eru kreativ á Argjum

Seinastu tveir dagarnar hevur eitt sokallað íblástrarskeið verið á Verkstaðnum Vón á Argjum. Danskur lærari er komin til Føroya í samband við skeiðið

SKEIÐ
Ingrid Bjarnastein

Uttast til vinstru Maud Wang Hansen, skeiðlærari, og uttast til høgru Eva Tworek, lærari

Vardu verkstøðini og verkhúsini kring landið eru kend fyri at hava ymisk sløg av framleiðslu í teirra dagliga arbeiði.

Maud Wang Heinesen hevur tí skipað fyri hesum skeiðnum fyri at fáa íblástur til okkurt nýtt innan arbeiðið hjá verkstøðunum og verkhúsunum, og er ein danskur lærari komin til Føroya júst til hetta høvið.

Fýra verkstøð eru stáplaði upp á beinini á Verkstaðnum Vón. Á einum verkstaði prýða tey glas, eskjur og ymsar lutir við serviettum. Eitt verkstað verður nýtt til smykkur. Har gera tey hálsprýði, hattanálir og annað. Øll prýðini eru nikkelfrí. Eitt serligt arbeiðslag, ið eitur »gizmo« verður nýtt tá prýðini verða gjørd. Hetta er ein spiralur, ið er gjørdur burturúr metaltráði.

Verkstaður nummar trý er har danski lærarin, Eva Tworek, hevur sítt serliga øki. Har gera tey gávukort uppá ymsar mátar. Eva Tworek hevur givið út bók í samband við gávukort. Til dømis læra tey at gera gávukort við rútum í. Í rútarnar kann leggjast turkaðar blómur, kryddaríir og annað.

Á fjórða og seinasta verkstaðnum verða sápur stoyptar. Sápurnar eru bæði í litum og hava anga.

Verkstaðið Vón hevur ein nýggjan hátt at turka blómur. Við hjálp av mikroovni og serligari pressu kanst tú turka blómur uppá bert tveir minuttir. Blómurnar verða so nýttar til lyklaringar, borðskánarar og annað.

– Vit vóna, at hetta kemur at síggjast aftur í verkstøðunum kring landið, sigur Maud Wang Hansen, skeiðleiðari, og leiðari á Verkstaðnum Vón. – Hetta er jú eitt íblástrarskeið fyri leiðarar á vardum verkstøðum og verkhúsum kring landið, og ætlanin er at fáa hetta sjónligt í teirra dagliga virksemi. Fólkini eru sjálv kreativ og tað er stuttligt at síggja, at so stórur áhugi er.

Skeiðið, sum endaði í gjár, hevði umleið 40 luttakarar, og ein lærara. Eisini var ein røsk kantinudama, sum skipaði fyri máltíðum til skeiðluttakararnar báðar dagarnar.